Sosialurin



# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg eri sinnaður at fara til London at prógva fyri bretum, at tað var ikki eg, sum myrdi Litvinenko*
*(Alexander Lugovoj)*

# Skutu eftir forsetum

**Eitt bilafylgi við georgiska forsetanum, Mikheil Saakashvili, og polska forsetanum, Lech Kaczyinski, mátti venda, tá tað var á veg inn í Suðurossetia í gjár**



*Polski forsetin, Lech Kaczynski, var týðiliga skelkaður av tilburðinum. Her er hann umgirdur av trygdarmonnum og hermonnum beint aftaná skotini*

*(Mynd: AFP)*

Bilarnir við teimum báðum forsetunum og fylgi teirra vóru komnir tætt at markinum til Suðurossetia, tá fleiri ávaringarskot vórðu latin av, so teir noyddust at venda aftur. Keldur á staðnum søgdu, at skotini fullu, tá teir báðir forsetarnir vóru farnir úr bilum sínum einar 30 metrar frá sjálvum markinum.

Georgiska innanríkisráðið segði stutt aftaná, at skotini komu úr einum umráði, sum russar hava eftirlitið við, men bæði Russland og Suðurossetia søgdu seinni, at tey høvdu einki við skottilburðin at gera.

Talskvinnan hjá georgiska forsetanum helt uppá, at tað vóru russiskir hermenn, sum skutu ávaringarskot eftir bilafylginum hjá teimum báðum forsetunum. Eitt vitni, sum ferðaðist saman við forsertunum, segði sambært Reuters, at bilafylgið var einar 30 metrar frá sjálvum markinum, tá skotini fullu. Sambært vitninum vóru menninir, sum skutu, í hermannabúna, og at teir sóu út til at vera suðurossetar.

- Vit hoyrdu skot frá maskinbyrsum einar 30 metrar burturi, segði polski forsetin, Lech Kaczynski, við polsku tíðindastovuna PAP í gjárkvøldið. Á einum tíðindafundi seinni í gjárkvøldið mælti hann ES til at taka málið upp.

- Eg mæli vinum mínum í Evropasamveldinum til at koma til tær røttu niðurstøðurnar av hesum tilburðinum, áðrenn tað er ov seint, segði polski forsetin.

Russland hevur havt eftirlit við Suðurossetia, síðani umráðið sleit seg leyst frá Georgia í august.



*Ein trygdarmaður roynir at verja georgiska forsetan, Mikhail Sakashviili*

*(Mynd: AFP)*

# Lugovoj: – Eg myrdi ikki Litvinenko

**Fyrrverandi KGB-maðurin Andrej Lugovoj, sigur seg vera til reiðar at fara til London at sannføra bretar um, at tað var ikki hann, sum myrdi Alexander Litvinenko**



*Dmitrij Kovtun (tv) og Andrej Lugovoj siga seg vera til reiðar at fara til Bretlands at prógva, at teir eru ósekir*

*Mynd: AFP)*

Andrej Lugovoj er lagdur undir at hava beint fyri fyrrverandi KGB-manninum Alexander Litvinenko í London á heysti í 2006, men hann heldur uppá, at hann er ósekur, og at talan er um eina samansvørjing.

Alexander Litvinenko doyði á einum sjúkrahúsi í London fyri tveimum árum síðani, eftir at hann hevði fingið tað geislavirkna evnið polonium niður í seg. Bretska ákæruvaldið sigur, at tað var tann 42 ára gamli Lugovoj, sum eitraði Litvinenko. Bretar hava kravt at fáa hann útflýggjaðan, men Russland sigur nei. Nú sigur Lugovoj, at hann ætlar sær sjálvboðin til Bretlands at prógva, at hann er ósekur.

- Eg eri til reiðar at fara til Bretlands at krevja, at ákæruvaldið fer at kanna málið, skal Lugovoj hava sagt við russiska útvarpið Ekho Moskvi.

Bretska blaðið The Times hevur hitt Andrej Lugovoj í Moskva. Hann heldur uppá, at hann er ósekur, og at tað var tann bretska fregnartænastan MI6, sum valdi hann til syndabukk.

Umframt Lugovoj hevur bretska fregnartænastan illgruna til vinmann hansara, Dmitrij Kovtun. Kanningar hjá bretsku myndugleikunum hava avdúkað, at Kovtun var í London um tað mundið, tá Litvinenko bleiv eitraður, og kanningarnar avdúkaðu eisini, at hann hevði fingist við pollonium. Dmitrij Kovtun sigur við The Times, at hann er eisini til reiðar at fara til Bretlands.

# Abbas er forseti í Palestina

Aðalstjórnin í palestinska frælsisfelagsskapinum PLO samtykti í gjár at staðfesta, at Mahmoud Abbas er forseti í Palestina. 74 av teimum 75 limunum í aðalstjórnini atkvøddu fyri at geva Abbas forsetaheitið Samtyktin hevur ikki løgfrøðiliga støðu, tí enn hava palestinar ikki fingið nakað sjálvstøðugt ríki. Mahmoud Abbas hevur verið forseti í teimum palestinsku sjálvstýrisøkjunum síðani 2005.

## STUTT SAGT

### Ikki krossar í skúlunum

Ein dómari í norðurspanska býnum Valladolid hevur gjørt av, at allir krossar skulu takast niður í teimum skúlunum, sum teir almennu sponsku ríkismyndugleikarnir reka. Dómarin gjørdi úrskurð í einum máli, sum nakrir borgarar og nøkur feløg høvdu lagt fyri rættin. Tey vístu á, at í sponsku grundlógini er trúarfrælsið tryggjað, og tí hildu tey, at tað stríðir ímóti grundlógini, at teir almennu skúlarnir eru prýddir við tí kristna krossinum.

Sjálv kæran snúði seg um ein ávísan skúla, og dómarin, Alejandro Valentin, gav leiðsluni í Macias Picavea-skúlanum boð um at beina allar kristnar krossar í skúlastovum og felagshølum burtur.

Í úrskurðinum skrivar dómarin millum annað, at kristnir krossar í almennum skúlum kunnu geva fólki ta fatan, at tað spanska ríkið stendur nærri teirri katólsku kirkjuni enn øðrum trúarsamfeløgum. Spanskir fjølmiðlar siga, at hetta er fyrstu ferð, at ein spanskur dómari hevur felt slíkan dóm.



*Kristnir krossar eiga ikki at vera í almennum skúlum, sigur spanski dómarin*

*(Mynd: AFP)*

### Løgreglumenn doyðu í ferðsluni

Ein ferðsluvanlukka í Norðurírlandi gjáranáttina kostaði fýra løgreglumonnum lívið. AP skrivar, at teir fýra menninir vóru á einari eftirlitsferð nær við strondina sunnan fyri Berlfast, tá bilur teirra brádliga fór út av vegnum og á rull.

Norðurírska løgreglan kannar nú, hví vanlukkan hendi. Einki bendir á, at nakar annar bilur ella nakað annað fólk var á leiðini, har løgreglubilurin fór útav, og løgreglan sigur seg heldur ikki hava nakra ábending um, at talan kann vera um eina brotsgerð.